ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Besta úrslitið nakrantíð



*Einki er at siga til, at fagnaðurin á liðnum var stórur, tá tær við sannførandi sigri á Noreg høvdu vissað sær bronsumerkið*

**Bronsumerkið, sum føroyska U19-liðið vann NM-kappingini í Noreg, er helst besta altjóða flogbóltsúrslitið hjá Føroyum yvirhøvur**

FLOGBÓLTUR
*Magnus Tausen*

Føroysku flogbóltsgenturnar framdu satt bragd í Nevza-kappingini í Randaberg í Noregi um vikuskiftið. Ongantíð áður hevur eydnast okkum at vinna heiðursmerki í hesi sterku kapping, men gongdin seinastu árini hevur bent á, at okkurt gott var í væntu

### Vildu vaska tapið av sær

Fyrsti dysturin í kappingini gjørdist stórt vónbrot. Vit høvdu sett okkum fyri at vinna á Noregi, men tann ætlanin brast so ruddiliga. Tá ið so møguleikin var aftur í bronsudystinum skuldi einki koma í vegin.

Eftir fyrsta settið vóru venjararnir báðir heldur ivasamir, um hetta mundi fara at eydnast, tí hóast føroysku genturnar høvdu fleiri settbóltar, so megnaðu tær ikki at binda fyri, og taptu tí settið. Venjararnir vóru vónbrotnir, men genturnar hildu høvdið kalt og fóru undir truplu uppgávuna at venda dystinum, og tað eydnaðist til fulnar.

### Ótrúligt liðavrik

Tá ið hugt verður at liðunum spælara fyri spælara, so skuldi verið ómøguligt hjá Føroyum at vunnið. Norska liðið man hava eina miðalhædd sum er um 10 cm. hægri enn okkara leikarar, men tá er neyðugt at aðrar dygdir koma fram, og tær dygdirnar hava okkara gentur.

Føroyska liðið var alla kappingina ómetaliga væl samansveisað. Tær stríddust hvør fyri aðra, og fingu nógvar ómøguligar bóltar aftur í spæl. Tá ið so bit kom í álopini, og blokkurin rættiliga kom fyri seg, misti norska liðið mótið. Tað var líka mikið hvat tær gjørdu, so svaraðu føroysku genturnar aftur, og sum dysturin leið, var eingin ivi. Vit fóru at vinna!

### Nógv rós

Føroysku genturnar spældu og sungu seg inn í hjørtuni á øllum í Noregi. Góða lagið hjá teimum smittaði av, og bussførari okkara hoyrdi góðan sang á hvørjum túri. Hann helt røðu fyri gentunum seinasta dagin og takkaði fyri hesar dagarnar. "Eg gloymi tykkum aldri. Tykkara góða sang og fittu smíl".

Flogbólturin hjá okkara gentum fekk eisini nógv rósandi orð. Norski venjarin, sum er úr Japan, kom eftir dystin og bað um at kunna siga nøkur orð. "Tit eru óført. Tit spæla góðan flogbólt, men einki er sum góða samanhaldið og góða lagið hjá tykkum". Hóast hann var vónbrotin um egna tapið, var hann glaður um føroyska sigurin.

Eisini venjarin hjá enska dreingjaliðnum hevði nógv rósandi orð. "Tær eru sera væl fyri tekniskt. Tað er sum um, at tær spæla saman hvønn dag. Tær hava prógvað, at flogbóltur er annað enn hædd og styrki. They where an inspiration to watch!"




*Sosialurin mannar Formula-liðið við teimum spælarum, sum stóðu seg best í 23. umfarinum av Formula-deildini*